

# ÚTBJÓÐING

## RØKTARHEIM Í NORÐSTREYMI

Fyri "Kommunufelagsskapin í Sundalagnum" verður arbeiðið til nýtt røktarheim í Streymnesi boðið út alment í **heildarveiting** og fevnir um hesar arbeiðstøkur:

- Jørð- og kloakkarbeiði
- Betongarbeiði
- Timburarbeiði
- Snikkaraarbeiði
- Múraraarbeiði
- Málaraarbeiði
- Gólvaleggingararbeiði
- Lendisarbeiði
- Hitaverk, sanitet og ventilatión
- El - arbeiði

Útbjóðingartilfarið fæst móti kr. 5.000,00 í veð fyri krossaðum kekki, við at venda sær til teknistovuna hjá Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen, arkitektar A.F. í seinasta lagi mikudagin 25. februar 2004.

Tilboð skulu, saman við útbjóðingartilfarinum, latast inn á teknistovuna hjá Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen, arkitektar A.F., Lucas Debesargøta 11, Tórshavn í afturlatnum brævbjálva merktur:

**RØKTARHEIM Í NORÐSTREYMI**
Tilboð

Í seinasta lagi fríggjadagin **26. mars 2004 kl. 16.00**
Boðini verða latin upp og kunnu teir bjóðandi verða hjástaddir.

ALBERT ISFELD & GUDMUND S. HANSEN arkitektar
Lucas Debesargøta 11 - 100 Tórshavn

LANDSBYGGIFELAGIÐ, ráðgevandi verkfrøðingar
Grønlandsvegur 5 - 100 Tórshavn

MARTIN E. LEO, ráðgevandi verkfrøðingur
Tórsgøta 24 - 100 Tórshavn

VERI-CON, ráðgevandi verkfrøðingur
Maritugøta 8 - 188 Hoyvík

VINNUHÚSIÐ
House of Industry



Húsini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag R.C. Effersøesgøta 30 í Tórshavn verða lýst til sølu.

Húsini eru bygd í 1968 og eru uml. 290 m² í trimum hæddum kjallara, miðhædd og loft. Í húsinum eru 7 skrivstovur og 2 fundarhøli. Teldunet er innlagt í húsið. Húsini standa mitt í býnum. Parkeringsøki, sum rúmar 8-10 bilum, er aftanfyri húsini. Húsini eru vælegnað til skrivstovuhølir, men niðasta hæddin kann eisini brúkast sum handilshølir.

Áhugað, sum ynskja at síggja húsini, kunnu venda sær til umsitingina í Vinnuhúsinum.

Møgulig boð upp á húsini skulu latast skrivliga til Vinnuhúsið, umvegis fax ella teldupost á industry@industry.fo

Myndir av húsinum innan og uttan eru at síggja á heimasíðu okkara www.industry.fo

Vinnuhúsið • Boks 1038 • R. C. Effersøesgøta 30 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 31 18 64 • Fax +298 31 72 78 • E-mail: industry@industry.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo






Tekniski Skúlin Klaksvík

# Skeið í grundleggjandi PLC-teknik, EFU nr. E0147

Skeiðið er ætlað elektrikkarum, maskinmeistarum o.ø. Skeiðið gevur luttakaranum eina grundleggjandi vitan og møguleika fyri at koma ígongd við PLC-stýringar.

**Tíð**
1 vika, 8.-12. mars 2004, 5 dagar, 37 undirvísingartímar.

**Endamál**
Luttakarin kann – á elektrikkarastigi – greiða frá hvar og hvussu PLC-skipanir virka. Hartil er luttakarin førur fyri at seta upp, leggja inn, seta ígongd og forrita smærri industriellar PLC-skipanir. Umframt verður luttakarin førur fyri at forrita broytingar í verandi skipanum.

**Innihald**
Innleiðsla, Alment um PLC-skipanir, Virkisháttur, Diagram og forriting, Uppseting og innlegging.

**Undirvísari**
Åge Thordal Mortensen, Skive Tekniske Skole.

**Kostnaður**
Kr. 5.500,- Møguleiki er fyri at søkja um fullan ella partvísan stuðul sambært reglugerð um **»Stuðul til eftirútbúgving av yrkislærdum«.**

**Stað**
El-deildin á Tekniska Skúla í Klaksvík

**Freist**
Seinasta freist at boða frá luttøku er 27. februar – á telefon nr. 45 63 11 ella telefax 45 73 11.

# Málsviðgeri til ALS

Lýst verður við hesum eftir málsviðgera til Tryggingar- & ávísingardeildina hjá Arbeiðsloysisskipanini

**Starvið:**
Uppgávurnar hjá málsviðgeranum eru í høvuðsheitum:

- málsviðgerð í sambandi við arbeiðsloysistrygging
- samrøður og samskifti annars við viðskiftafólk okkara
- at verða við til at tillaga og menna tænasturnar hjá ALS

**Førleiki:**
Vit vænta okkum m.a., at tú

- hevur hóskandi útbúgving
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- kanst arbeiða við ymiskum uppgávum samstundis
- hevur góð samstarvsevni
- dugir væl at samskifta bæði í skrift og talu
- hevur góðan teldukunnleika

Fyrimunur er, um tú hevur arbeiðsroyndir innan fyrisiting og innlit í føroyska arbeiðsmarknaðin.

**Vit bjóða:**
Eitt ábyrgdarfult og sjálvstøðugt starv í einum dynamiskum umhvørvi, har dentur verður lagdur á skjóta og góða tænastu.

Góðir møguleikar eru fyri skeiðluttøku og eftirútbúgving.

Løn sambært avtalu.

**Umsókn:**
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera ALS í hendi í seinasta lagi **týsdagin 24. februar 2004**

Umsóknir skulu sendast til:

**Arbeiðsloysisskipanin, Postsmoga 3022, 110 Tórshavn**

Miðað verður eftir, at starvið verður sett sum skjótast.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Petur Elias Nielsen, deildarleiðara, á tel. 349550 ella á teldupostadressu petur@als.fo

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

ALS
Arbeiðsloysisskipanin
Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo

## Frá Arbeiðsmannafelagnum Framtíðini í Vági

# Ársaðalfundur

verður í Framtíðini 3. mars kl. 19.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

Um ikki nóg nógvir møta, verður eykaaðalfundur hálvan tíma seinni.

**Arbeiðsmannafelagið Framtíðin**

# Grundstykkir í Funningsfirði

Við hesum verða trý grundstykkir í góðum byggilendi í Funningsfirði lýst til sølu.

Stødd: uml. 500 m²
Prísur: kr. 15.000,00

Nærri upplýsingar fáast frá borgarstjóranum á tlf. 441348 ella 223762.

**Elduvíkar kommuna**
tlf. 441348

# Grundstykki til sølu

Matr. nr. 91C 1164 km² liggur miðskeiðis á Argjum, við sera góðum útsýni.

Boð undir 1 mió. ongan áhuga.

**Valbjørn Dalsgarð, byggimeistari**
**tlf. 219279**

# Til sølu

Sproytikabina bíliga til sølu. Klár at seta upp.

**Tlf. 214232**

# Skrivstovuhøli í Tórshavn til leigu



Ogn í Mikinesgøtu verður við hesum leigað út.

Talan er um eitt ella møguliga tvey leigumál av allari ovaru hæddini, sum er 300 m² og 100 m² av niðaru hæddini. Leigumál kann byrja beinanvegin.

Á ognini eru góð parkeringsviðurskifti.

Áhugaði verða biðin um at venda sær til Advokatskrivstovuna og spyrja eftir Niels Winther Poulsen ella skrivaran.

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn**
Halgir Winther Poulsen, adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Tlf. 31 11 45

Sosialurin
-tað loysir seg